# framtíðin



*Ransin N. Djurhuus, sum lærir hjá málarameistaranum Tommy Falkenberg roynir sproytuna*



*Tekniskur ráðgevi frá Sigma-máling Thomas Ryger, undirvísarin Benny Madsen og Sri S. Jacobsen frá SRI Málinig*



*Lars Jacobsen Jensen, lærlingur hjá Una Zachariasen*

## Hent men vandamikið

**Martin í Nesi** úr Hvalba hevur arbeitt við sproytum í nógv ár. Men ikki fyrrenn nú hevur hann til fulnar skilt, hvussu hent hetta amboðið í roynd og veru er.

- Eg havi brúkt tær í nógv ár, uttan rættiliga at vita, hvussu tær virkaðu. Men tað veit eg nú, sigur hann.

Hann hevur fyri tað mesta brúkt sproyturnar til grovt arbeiði, sum til dømis máling av húsatekjum.

Hetta ætlar hann sær sjálvandi at halda fram við, men nú fer hann eisini at kunna átaka sær at mála til dømis hurðar og annað innanveggja við sproytu.

Hetta sama sigur **Anskar Hansen** úr Klaksvík, sum er sera fegin um hetta áhugaverda skeiðið.

- Eg havi arbeitt við sproytum í mong ár, og eg helt, satt at siga, at eg hevði einki eftir at læra. Men eg bleiv so grundiga settur uppá pláss á skeiðnum, greiðir hann frá.

Við kønum undirvísarum fingu teir at vita um fleiri tekniskar finessur og møguleikar við sproytunum. Samstundis fingu teir eisini at vita, hvussu vandamiklar tær kunnu vera, um ein ikki ansar nóg væl eftir.

- Ja, vit fingu at vita, at ein slík sproyta er eins vandamikil og ein lødd byrsa. Tað gav okkum øllum nakað av hugsa um, sigur Anskar.

# Nýtt oljufund kann seta ferð á í Barentshavinum



*Seinastu 27 árini eru 70 brunnar boraðir í Barnstshavinum, men bara tveir, Snøhvit og Goliat, hava víst seg at hava so mikið av olju, at tað kann løna seg at taka hana upp. Nú er tann triði funnin.*

**Norsk Hydro hevur funnið eina stóra olju- og gassleið við Nordkapp.**

OLJULEITING
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Hvørki Norsk Hydro ella oljumálaráðið í Oslo vildu gera viðmerkingar tiltíðindini í norskum fjølmiðlum í gjár um, at Norsk Hydro hevur funnið eina stóra olju- og gassleið á Nuculaleiðini við Nordkapp.

Tað hevur ljóðað í seinastuni, at Norsk Hydro hevði funnið eina nýggja leið við Nordkapp, og í síðstu viku vildi tíðarritið Upstream vera við, at talan var um eitt stórt fund.

-Vit koma við einari frágreiðing aftan á 1. mars, segði talsmaðurin fyri leitingini hjá oljufelagnum, Christer Af Gejerstam, við Aftenposten.

Arvid Jensen, nevndarformaður í vinnufelagnum Petro Arctic, segði við Dagens Næringsliv, at tað nýggja fundið kann vera tað, sum skuldi til fyri at fáa ferð á oljuvinnuna í Barentshavinum.

Norskir fjølmiðlar vilja vera við, at millum 300 og 500 mió. tunnur av olju eru í nýggja brunninum. Til samanberingar kann nevnast, at Goliat-leiðin er mett til umleið 250 mió. tunnur. Tað eru bara 25 fjórðingar ímillum tær báðar leiðirnar, sum kortini eru í hvør sínum jarðfrøðiliga øki.

Umhvørvisverndarfelagsskapir eru alt annað enn fegnir um eina komandi oljuvinnu í Barentshavinum, og útbyggingarnar á Snøhvitleiðini og Goliatleiðini hava møtt harðari mótstøðu. Sambært Aftenposten fær Nuculaleiðin neyvan betri undirtøku, tí hon er so nær landi, at møguligir pallar har kunnu síggjast frá Nordkapp, har ferðafólk í stórum tali vitja á hvørjum ári.

Og tað eru ikki júst oljupallar, tey koma at hyggja at.

# Oljukavarar krevja stórt endurgjald

**Kavarar, sum fingu varandi mein av kavingini í sambandi við tær fyrstu norsku oljuleitingarnar, eru nú í rættinum og krevja endurgjald.**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Fakfelagið Industri Energi hevur vegna fýra av sínum limum stevnt norska statinum eftir endurgjaldi fyri varandi mein, sum teir fýra fingu av at kava í sambandi við tær fyrstu oljuleitingarnar á norska landgrunninum í árunum frá 1967 til 1990.

-Kavararnir vórðu sendir at loysa uppgávur, sum góvu teimum varandi mein, segði sakførarin hjá teimum fýra, tá rættarmálið byrjaði í tingrættinum í Oslo fyrrapartin í gjár. Umleið 20 aðrir fyrrverandi kavarar vóru komnir at lurta, tí úrskurðurin hjá rættinum kann fáa týdning fyri teir.

Kravið hjá teimum fýra er, at Statoil skal dømast at átaka sær ábyrgdina av, at teir mistu heilsuna av kavingini, og tá tað er tað almenna, sum eigur oljufelagið, er kravið vent ímóti tí almenna. Teir halda uppá, at Statoil var vitandi um, hvørjum vanda teir vóru í, og fáa teir viðhald í hesum, fær úrskurðurin týdning fyri fleiri tíggjutals aðrar fyrrverandi kavarar.

Enn eru eingi beinleiðis endurgjaldskrøv sett fram, tí tey skulu setast upp eftir viðurskiftunum hjá hvørjum einstøkum. Kortini er greitt, at talan verður um stór tøl. T. d. verður mett, at ein kavari, sum í dag er um 50 ára aldur, og sum fekk varandi mein av at kava fyri Statoil fyrst í áttatiárunum, kann krevja millum 13 og 15 mió. norskar krónur í endurgjaldi.